**HAVBÚNAÐARFELAGIÐ**

**Fiskimálaráðið**
**fisk@fisk.fo**

Tórshavn 13. juli 2022

Okkara tilv./Our ref.
/Havbxn-HBF---Vixv.-uppskoti-til-b.docx
Tykkara tilv./Your ref. 22/13268-4

## Viðv. uppskoti til broyting í grindakunngerðini

Havbúnaðarfelagið takkar fyri møguleikan at ummæla uppskot til broyting í grindakunngerðini. Viðmerkingarnar hjá Havbúnaðarfelagnum snúgva seg um tær broytingar, sum hava við springaraveiðu at gera. Í stuttum snýr broytingaruppskotið hjá Fiskimálaráðnum seg um at áseta eitt árligt hámark á 500 fyri veiðu av skjórutum springarum í ávíkavist 2022 og 2023. Frá 2024 verður hámarkið sett sambært tilmæli frá NAMMCO.

Hóast tað er eitt lítið framstig, at eitt hámark nú verður sett, heldur Havbúnaðarfelagið fast við, at tað eigur at verða sett eitt fullkomið bann fyri at taka ella veiða skjórutar springarar (delfinir). Fyri tað um Føroyar halda seg hava rætt til at drepa springarar, merkir tað ikki, at tað er tað rætta fyri Føroyar at gera.

Sum Havbúnaðarfelagið fyrr hevur víst á, hava avleiðingarnar av springaradrápinum í Skálafirði tann 12. september 2021 verið ógvusligar og víðfevndar fyri alivinnuna, bæði tá tað kemur til umdømi og sølu. Og fyri hvørt springaradráp økist vandin fyri enn meira víðfevndum avleiðingum. Tað er fyri Havbúnaðarfelagið óskiljandi at marknaðarváðin av framhaldandi springaradrápum als ikki verður nevndur í tí uppriti, sum skal lýsa nýggja kunngerðaruppskotið. Tað stendur bert í uppritinum, at tað ikki verður mett, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar. Men framhaldandi springaradráp fer við rættiliga stórari vissu at hava fíggjarligar avleiðingar fyri føroysku alivinnuna, og harvið eisini fyri Føroyar og føroyska landskassan.

Í hesum døgum, har marknaðaratgongd ikki er nøkur sjálvfylgja, er tað av stórum týdningi, at føroysku myndugleikarnir ikki við tilætlaðum gerðum seta okkum í eina støðu, har tað verður nógv torførari at selja okkara vørur á týðandi marknaðum.

Ávirkanin frá framhaldandi springaradrápum kann næstan ikki yvirmetast. Fleiri stórar handilsketur hava sagt, at tey meta framhaldandi dráp vera størstu hóttanina móti føroyskum útflutningi yvirhøvur. Føroyska alivinnan er sera stúrin um avleiðingarnar, um eitt springaradráp afturat skuldi verið framt í Føroyum.

Eingi útlit eru til, at henda støðan fer at broytast, heldur tvørturímóti. Fólk kring heimin eru vorðin sera tilvitað um burðardygd og djóravælferð, serliga yngri fólk. Harumframt hava springarar/delfinir eina serliga støðu í tilvitskuni hjá fólki.

Hetta hevur við sær, at handlar og handilsketur í alsamt minni mun vilja taka tann váðan uppá seg, at gerast partur av einari herferð móti føroyskum fiskavørum, orsakað av springaradrápi.

Vit liva í dag í einum framkomnum vælferðarsamfelagi, har okkara útflutningur er fundamentið undir okkara vælferð, og alivinnan stendur fyri einari helvt av samlaða vøruútflutninginum í Føroyum. Um man vil tað ella ikki, so má politiska skipanin fyrihalda seg til henda veruleika, og taka tað í álvara, hvat fólk, sum skulu eta okkara fiskavørur, halda um tað, sum fyriferst í Føroyum.

Í hesum sambandi skal Havbúnaðarfelagið vísa á, at dráp av stórum bólkum av springarum ikki er siðvenja ella føroysk mentan. Flestu pláss í Føroyum hava onga siðvenju fyri beinleiðis veiðu av springarum, og tí er hetta málið einans ein spurningur um, hvat er best fyri føroyska samfelagið at gera. Og her er eingin

ivi um, at vansarnir eru munandi størri enn teir fyrimunir, sum onkur sær í at halda fram við springaradrápum.

Havbúnaðarfelagið fer tí at mæla politiska myndugleikanum til at banna beinleiðis springaradrápum í Føroyum, áðrenn eitt nýtt dráp verður framt, sum kann fáa uppaftur meira víðfevndar og drúgvari avleiðingar, enn hendingarnar 12. september 2021 høvdu og framvegis hava.

Vinarliga,

Nevndin í Havbúnaðarfelagnum.

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo